# Merkisdagar

### Diamantbrúdleyp
Mánadagin 18. apríl 2011 kunnu hjúnini Eyðgerð og Tummas Bærentsen á Hellu í Kvívík hátíðarhalda 60 ára brúdleypsdag. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 15. apríl hava Ebba og Olaf Petersen, Vági, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

### Silvurbrúdleyp
24. apríl hava hjúnini Fía & Petur í Túni, Toftir, silvurbrúdleyp. Vælkomst verður á Svangaskarði, leygardagin 30. apríl frá kl. 17.00 Hjartaliga vælkomin.
*Fía & Petur*

### Brúdleyp
Leygardagin 16. apríl giftast Rannvá Jacobsen og James við Brúgv, Tórshavn. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 14.00. Brúdleypsveitsla verður fyri innbodnum í B36 húsinum kl. 18.00.

### Brúdleyp
Mikudagin 27. apríl giftast í Bangkok Kanitsara Chawna úr Thailandi og Ernst Magnussen av Nesi. Tey hava í hesum sambandi postadressu á Nesvegi 67, 655 Nes el. ernstmagnussen@gmail.com

### Brúdleyp
Leygardagin 11.juni 2011 giftast Malan Ludvig, Tórshavn og Dávur Brøðraberg, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, og nátturði verður í Sjóndeplinum í Tórshavn frá kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 251008 (Malan) ella á tlf. 215060 (Dávur) innan 15.mai 2011.

### 90 ára føðingardagur
Sunnudagin 17. apríl fyllir Hjørdis á Argjaboða Argir 90 ár, dagurin verður hildin saman við børnunum...



### 80 ára føðingardagur
Skírishósdag 21. apríl verður Martha Poulsen, Tórshavn, 80 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshølinum, J. H. Schrødersgøta 9 millum kl 17 og 21, har øll eru hjartaliga vælkomin

### 80 ára føðingardagur
Fríggjadagin 22. apríl fyllir Dana Hammer, Nes, 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 23. apríl í Missiónshúsinum Thabor á Toftum frá kl. 12 - 17, øll eru hjartaliga vælkomin.

### 50 og 55 ára føðingardagar
Mariane Haraldsen og Fróði Ólason Olsen, Viðargøta 50, Argir, fylla 50 og 55 ár. Føðingardagarnir vera hildnir í Róðrarneystinum 14.5 kl 18. Tað hevði glett okkum at sæð skyldfólk, vinir og kenningar. Vinarliga sigi frá á tlf. 311299 innan 1.5.11.

### Prógv
Helgi Winther Olsen úr Tórshavn hevur lokið prógv í sivilverkfrøði innan heilsutøkni (Medicin og Teknologi) á Danmarks Tekniske Universitet.



### Brúdleyp
Leygardagin 30.apríl 2011 giftast Hanna Hanusardóttir Hansen, Fuglafjørður og Ingi Elmelund Petersen, Tórshavn. Vígsla og móttøka verður úti á skúlaheiminum við Marknagilsvegin kl.09.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 7. mai halda vit, Valborg og Kári Kjelnæs, Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Lorvík ll. 19.00 Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá innan hósdagin 28. apríl á tlf. 455644 ella tlf. 256000
ella á *kkksls@olivant.fo*

# Tøkkir



Vit takka øllum hjartaliga, sum gjørdu hjúnabandsdag okkara 30. des. 2010 í Klaksvík so hendinga hugnaligan og heimligan.
Vitjanir, blómur, gávur, køkur, heilsanir, sangir og gott undirspæl eiga tit øll eina hjartans tøkk fyri.
**Súsanna & Svend**



Vit vilja takka øllum, sum gleddust saman við okkum til silvurbrúdleyp okkara. Takk fyri blómur, gávur, heilsanir á ymiskan hátt, takk fyri at so mong av tykkum settu tíð av at koma í silvurbrúdleyp. Takk fyri sang, spæl, talur og framførðslur, eisini til tykkum, sum høvdu fyrireika tykkum, men ikki sluppu framat :-)! Eisini vilja vit takka tykkum, sum stákaðust, so hetta kundi lata seg gera, bæði meðan veitslan var og áðrenn og aftaná. Hjartans tøkk øll somul. Vit ynskja øllum einar gleðiligar páskir og Harrans signing.
Heilsan
**Eli, Brita og børnini**